# Eivør útsett fyri mangt og hvat

**Fløgan við Eivør Pálsdóttir og DR Big Band er stór og góð og víðfevnd. Ein stórur gloypubiti, har ein tó kennir teir góðu og kendu smakkirnar aftur, men hesaferð kryddraðir øðrvísi**

TÓNLEIKUR
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*

Big Bandið hjá Danmarks Radio hevur megnað at fingið í lag útgávu, har gávuríka songkvinnan Eivør Pálsdóttir er við. Og í júst umvendari raðfylgju tykist tað øvugt, at fløgan eitur "Trøllabundin, Danish Radio Big Band & Eivør Pálsdóttir".

Tað átti sjálvandi at verið Eivør fyrst og síðani stóri hópurin av dugnaligum tónleikarum.

Tað ber fløgan í hvussu er prógv um. Tí tað er í stóran mun Eivør, ið gevur útgávuni flog.

Staðfestast kann eisini, at hetta er ein útgáva av teimum stóru og góðskumiklu.

## Útsett

Á fløguni eru løg, ið vit kenna frá undanfarnum útgávum. Men her eru tey útsett fyri fleiri og øðrvísi ljóðføri. Útsetingin er ein onnur, men tó ikki so ólík teim undanfarnu.

Men hetta er øðrvísi, spennandi, fleirfalt, stórt (big) og fleiri tónar eru at spæla við. Okkurt spennandi og heldur disharmoniskt.

Men harvið er ikki sagt, at hetta er tað, ið fellur léttast hjá breiðu lurtarafjøldini, uttan at niðurgerða nakran.

Men á ein hátt er hetta, sum at koma at kenna Eivør aftur. Jazzkenda sniðið minnir meira um upprunan og hennara fyrstu fløgu við Ivory. Hetta sagt, eftir at tónarnir við Eivør og Bill Bourne hava ljóðmað longi. Har er talan um tað meira fólksliga. Og í øllum hesum sæst so eisini, at Eivør spennir víða í sangvirksemi sínum.

Frálíka guitarsolospælið í Mín Móðir er kærkomið frávik hjá teimum, ið halla meira til vísu og rocktónleikin. Annars er at siga, at nógv kingo- og kvæðakent at hoyra.

Lær meg Guð at Liva er meira jazzkent, og at útseta Guð fyri jazz er heldur forkunnugt á føroyskum. Men tað riggar.

## Big

Hetta er ein stór útgáva. Bæði skilt sum góð og frálík, men eisini við teim mongu tónleikarunum, sum nú einaferð mynda eitt Big Band.

Har eru eini 20 - 25 tónleikarar, mest mannfólk, ið so dugnaliga passa blásturin og ymiskt annað. Men tað skerst ikki burtur, at tað er Eivør, ið ber útgávuni uppi, so allur blásturin ikki er til fánýtis og fer unidir kav.

Hinvegin er tað eisini meiningin.Hon skal bera útgávuna og restin vera undirlag. Soleiðis verður spælt og soleiðis er útsett í stóran mun.

Og annan veg er vert at skriva sær handan bæði oyru, at tað er ikki ein og hvør, ið fær áheitan frá DR Big Band. Men samstarvið millum Eivør og Bigbandið er eydnast.

Gleðiligt og spennandi er eisini, at í næstum fara tey á pall saman í Keypmannahavn í Copenhagen Jazz-House.

Samanumtikið kann stutt sigast um fløguna Trøllabundin, at hon riggar. Ein skal tó gera sær greitt, at her er tað bigband tónleikur, ið setur dagsskránna, tó at Eivør og hennara tilfar bera hesum uppi.

Flott og væl avstaðfarið.

Fløguhúsin boðar longu frá byrjan frá góðum. Sera snotiligur og við góðum myndum, har Eivør vát og trøllslig kemur úr vatninum (onkur teskaði greinskrivaranum, at hetta er tikið í Bláa Lóninum). Í øllum førum riggar tað, og kámu og glarkendu millumsíðurnar seta eisini rætta dámin á.

Jú, ein kann og skal spæla fløguna ofta. Oftari og oftari. Hvørja ferð okkurt at gerast trøllabundin av. Kanska er navnið ikki komið av ongum!



INNLENDISMÁLARÁÐIÐ

AVLOYSARAR FYRI FULLTRÚAR

Tvey avloysarastørv fyri fulltrúar í farloyvi í Innlendismálaráðnum eru leys at søkja.

Høvuðsuppgávurnar eru málsviðgerð og at gera lógarsmíð á teimum økjum, ið ráðið umsitur.

Umsøkjarar skulu hava løgfrøðiligt embætisprógv. Lesandi, sum væntandi verða liðug í summar, eru eisini vælkomin at søkja

Umsøkjarar skulu hava góð samstarvsevni, vera áhitnir, miðvísir, kunna arbeiða sjálvstøðugt og vera til reiðar at royna nýggjar avbjóðingar. Umsøkjarar skulu harumframt hava góðan kunnleika til føroyskt mál.

Annað starvið verður sett skjótast til ber, hitt frá 1. august. Setanartíðin er eitt ár.

Løn og setanartreytir verða sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og BLF

Umsøkjarar, ið ynskja fleiri upplýsingar, eru vælkomnir at seta seg í samband við Rúna Joensen, aðalstjóra, tlf. 358080.

Umsóknir við prógvum, c.v. og møguligum viðmælum skulu sendast til

Innlendismálaráðið
Tinganesi
Postboks 159
110 Tórshavn

og skulu vera Innlendismálaráðnum í hendi í seinasta lagi mikudagin 30. mars 2005.

Innlendismálaráðið · Postboks 159 · 110 Tórshavn · Tlf 358080 · faks 358085 · imr@imr.fo · www.imr.fo

26. - 28. apríl

Til messu í Brússel ...
European Seafood Exposition





Vit flúgva beinleiðis til Brússel!

Flogferð úr Vágum til/ úr Brússel.
Úr Vágum 25. apríl - heim úr Brússel 28. apríl
Kostnaður fyri hvønn íroknað flogferð, ferðaavgjald og gisting í 3 nætur u/ morgunmat:

í einkultrúmi á Bedford Hotel.... 11.280,-
í einkultrúmi á NH Atlanta Hotel.... 12.510,-
Bert flogferðin báðar vegir íroknað ferðaavgjald...... 6.810,-

Bílegging: í seinasta lagi 1. apríl !

Les meira á okkara heimasíðu flogfelag.fo

FLOGFELAG FØROYA
Áarvegur 6 · Tel 34 00 00 · www.ff.fo